# Fremmanda gentan

TÍÐINDASKRIV

Á dramaverkstaðnum hjá Hjørdis Johansen hava børn seinastu mánaðarnar vant leikin fremmanda gentan og hesin verður frumsýndur sunnudaginø



Aftur í ár, sum seinastu undanfarnu árini, vera tað almennar sýningar fyri børnum og avvarðandi á Dramaverkstaðnum. Dramaverkstaðið er eitt sera virkið Barna og Ungdómssjónleikarafelag, sum arbeiður fyri at menna og vekja ans fyri sjónleiki og skipar fyri skeiðum. Nýtt skeið byrjaði í september 2001 við 75 børnum og ungum. Í løtuni eru 6 bólkar, og í ár eru tað tey yngstu sum framføra Leikaløtuna. Hetta eru almennar sýningar, har bæði stór og smá kunnu hugna sær og síggja sjónleik. Sýningarnar byrja sunnudagin 2. december og halda fram til 9. december, hvønn dag.

Á skránni er leikurin "Fremmanda Gentan", sum bólkurin við teimum 10 til 12 ára gomlu børnunum spæla. Hesi børnini vóru í Svøríki við leikinum í oktober 2001, og øll uttan tvey, sum hava tvey ár á baki, hava gingið á Dramaverkstaðnum í eitt ár. Eisini verður eitt "Krubbuspæl" framført, og verður hetta framført av heilt spildurnýggjum bólki, sum byrjaði í september í ár, saman við fyrrnevnda bólki. Umframt hesar leikirnar verður eisini felagssangur á skránni. Um tey vitjandi børnini ynskja tað, verða tey málaði í andlitinum og kunnu sleppa at royna seg á palli í "Krubbuspælinum".

Tilsamans eru tað 22 børn sum leika, og afturat teimum eru fleiri onnur í felagnum sum mála áskoðara-børnum og hjálpa til á annan hátt.

Pláss er bert fyri 40 áskoðarum í senn og børn undir 5 ár skulu vera saman við vaksnum. Tiltakið varar umleið 1 tíma. Atgongumerkir kunnu keypast í Kunningarstovuni og á Dramaverkstaðnum.




## Savna pening inn...?

Torgið í SMS hevur verið gott mið hjá mongum í mong ár. Og hetta verður tað helst framvegis. Men nú mugu áhuga- og ítróttarfeløg, skúlaflokkar og onnur søkja um loyvi, at hava inntøkufremjandi tiltøk á Torginum í SMS í 2002.

Greiðið frá, hvat innkomni peningurin skal nýtast til, hvat inntøkufremjandi tiltak, tit ætla at skipa fyri, og hvat spennandi tiltak ella framsýning - sum fær enn meir fólk inn í SMS - tit hava ætlanir um at hava.

Nýtið hugflogið og verðið skapandi. Tey mest spennandi tiltøkini verða vald út.

Eru ivamál, ber til at ringja á tel. 35 88 80.

*Umsóknir skulu sendast til SMF, Postboks 1059, 110 Tórshavn.*
*Seinasta freist at lata inn umsókn er 15. desembur 2001.*

SMS


## Rúna ikki Anna

Tað kemur fyri, at okkurt verður skrivað skeivt í bløðum. Vanliga verður roynt at fáa rætta hetta sum skjótast.

Í Sosialinum leygardagin kom ein heilt serlig villa fyri. Tað var greinin um borgara nummar 18.000, sum ikki var heilt røtt. Mamman at barninum kom í blaðnum at eita Anna Dalsgarð, men hetta er als ikki rætt. Mamma borgara nummar 18.000 eitur Rúna Jóannesardóttir Dalsgarð. Vit kunnu bert orsaka mistakið mangar gangir, og undirritaði átekur sær eisini fulla ábyrgd av mistakinum. Vit mugu eisini bert vóna, at borgari nummar 18.000 ikki fer at ivast í, hvør mamma hennara er, tá ið hon hevur lært seg at lesa.

**-Heri á Rógvi**


## Starvsfólk til KT-deildina á Føroya Tele

*"Vísir menn gera orðatøk, men býttlingar endurtaka tey"*

Samuel Palmer



Føroya Tele hevur seinastu árini støðugt víðkað um talið av tænastum, sum vit bjóða kundum okkara. Tað hevur ført við sær stóran vøkstur í fjøltættinum av uppgávunum á KT-deild okkara. Ein vøkstur, sum vit vænta heldur fram komandi árini.

Fyri framhaldandi at kunna avgreiða uppgávurnar á besta hátt, søkja vit tí eftir einum nýggjum starvsfólki til KT-deildina.

KT-deildin tekur sær av innanhýsis kunningartøkni á Føroya Tele. Tað vil m.a. siga uppseting, viðlíkahald, support og feilrættan av stórum UNIX-servarum, Oracle dátugrunnum og applikatiónum, fíluservarum, egintelduneti og mangum øðrum.

**KT-deildin tekur sær eisini av**
· stýring av verkætlanum
· innkeypi av tól- og ritbúnaði
· útvikling, menning og tillaging í samband við edv-búnað o.a., sum Føroya Tele nýtir innanhýsis og/ella letur kundunum

Eisini er KT-deildin við í menningini av framtíðar strategiarbeiði í Føroya Tele, eins og deildin er miðdepil í arbeiðnum við at finna og seta í verk bestu arbeiðshættirnar í fyritøkuni.

Starvsfólkið, sum vit søkja eftir, skal hava viðkomandi útbúgving sum verkfrøðingur, datalogur, cand. merc. dat. ella líknandi. Viðkomandi skal hava góðar menniskjansligar eginleikar og kunna vera við í verkætlanararbeiði.

**Royndir við einum ella fleiri av fylgjandi er ein fyrimunur:**
· Verkætlanarstýring
· Dátugrunnum (Oracle), Dba, tuning v.m.
· Fjarskiftisvinnu
· Oracle útviklingstólum
· UNIX-skipanum
· PL/SQL
· Búskaparfrøði og arbeiðshættum
· Java, Web-tøknifrøði

Nýútbúgvin eru eisini sera vælkomin at søkja.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Starvið er lønt sambært sáttmála hjá avvarðandi yrkisfelag.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Michael Thomsen, deildarleiðara, ella Starvsfólkadeildina á tlf. 303030.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. desember 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*





